Viðmerking til uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin) (Dagføring av gjøldum, veiðigjald fyri lodnu og heystgýtandi sild og strikan av undantaki fyri heimaflotan)

Føroya Fiskimannafelag hevur greiða meining um áseting av veiðugjøldum.

Í fyrsta umfarið halda vit, at slík veiðugjøld ikki hoyra heima í fiskivinnuni, tí fiskimenn eru teir, sum missa mest.

Okkara limir eru frammanundan teir, sum rinda størsta prísin, tá ið veiðugjøld og onnur gjøld vera løgd á fiskivinnuni.

Í øðrum lagi halda vit, at fíggjarpolitikkur landsins á ongan hátt skal taka okkara fiskivinnu/sjófólk sum gísla, soleiðis at nøgdin av fiski skal vera trygdarnet hjá landskassanum.

Sjófólk okkara, sum hendan lóg rakar, hava í ríkiligt mát nokk við sítt egna lívsgrundarlag. Í ávísum førum eru arbeiðsamboð teirra so niðurslitin orsakað av áløgdum gjøldum, at vandi er á ferð.

Um lógin hóast alt verður sett í gildi

Um løgtingið hóast hetta ásetir slík veiðugjøld, **sum vit eru harðliga ímóti**, so má hugsast alternativt, so rættvisi kemur í skipanina.

Rættvísi merkir, at tey, sum veiða mest, skulu gjalda mest.

Skal nakað høpi vera í at áseta veiðugjøld, so má hugsast um, hvussu smáu reiðaríini (ella rættari: reiðaríini, sum ikki hava so nógva kvotu) kunnu endurnýggja síni skip. Tey størru reiðaríini hava pening til slíka endurnýggjan.

Botnfrádráttur og progressiv avgjaldsskipan

Um skipanin verður sett í verk, sum vit eru harðliga ímóti, eigur ein ávísur botnfrádráttur at verða lagdur inn í skipanina og hareftir ein progressiv avgjaldsskipan. Botnfrádrátturin skal skiljast soleiðis, at tey fyrsti tonsini ikki skulu rinda avgjald.

Føroya Fiskimannafelag vísir á hesa skipanina, tí tey minnu reiðaríini sum oftast eru fíggjarliga veik. Tey minnu reiðaríini merkja avgjøldini nógv betur enn tey størru.

Við lógini, sum nú verður løgd fram, so fáa minnu reiðaríini ikki endurnýggja skipini, og tað halda vit er ein vansi fyri okkara sjófólk.

Við broytingini, sum her verður skotin upp, kunnu okkara sjófólk hava eina vón um, at tey fáa betri og tryggari veiðuamboð, tí tá verður peningur – og helst eisini vilji – til at endurnýggja veiðuamboðini.

Við einum botnfrádrátti og eini progressivari skipan fáa øll gleði av skipanini: sjófólk, tey minni reiðaríini og landskassin.

Við okkara skipan er trygd fyri, at landskassin fær tað, hann áleggur fiskivinnuni við botnfrádrátti og progressivari avgjaldsskipan.

Tey størri reiðaríini, sum hava nógva kvotu, rinda nógv. Tey minni reiðaríini fara at klára seg betur og hava møguleika at endurnýggja síni skip.

Alt í alt fáa okkara limir meir burturúr við okkara broytingum, enn um upprunauppskotið verður sett í gildið.

Vit gera framvegis vart við, at vit eru hart ímóti, at veiðugjøld vera áløgd.

Føroya Fiskimannafelag
Jan Højgaard, formaður